ítróttur

Nr. 192 • fríggjadagur • 8. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# ÍF heldur fram í 1. deild

**Við einum tryggum 5-1 sigri á B71 í Fuglafirði mikukvøldið tryggjaði ÍF sær framhaldandi sess í 1. deild. Magni á Lakjuni var við sínum trimum málum dagsins maður hjá fuglfirðingum**

UPP- OG NIÐURFLYTINGARSTRÍÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Magni á Lakjuni leggur ÍF á odda 4-1 fimm minuttir fyri leiklok og sløkkir harvið tær seinastu vónirnar hjá B71 um at vinna seg upp í 1. deild.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað var stórur spenningur undan seinna upp- og niðurflytingardystinum millum ÍF og B71, sum bleiv leiktur í Fuglafirði mikukvøldið. Fyrra dystin mánakvøldið vunnu sandoyingar á heimavølli 1-0, og tí var alt púra opið undan returdystinum í Fuglafirði. Stóri spenningurin hevði eisini við sær, at tað var sjáldsama stór áskoðarafjøld til dystin, hóast veðurgudarnir als ikki vístu seg frá síni bestu síðu. Nógv fólk var komið um Skopunarfjørð, og sum skilst vóru tveir fullir bussar av B71-viðhaldsfólki í Fuglafirði, umframt teir mongu sandoyingar, ið komu í egnum bilum.

### ÍF var omaná

Í fyrra hálvleiki høvdu fuglfirðingar vindin undan. Vindurin var nógvur, og tað var ógvuliga tungt hjá B71 at fáa nakað skipað álopsspæl í verk í nógva mótvindinum. Hinvegin dugdi heimaliðið heilt væl at brúka undanvindin, og tað var skjótt, at ÍF legði eitt ávíst trýst á verjuna hjá sandoyingum.

Um miðjan fyrra hálvleik fekk heimaliðið sett hol á. ÍF fekk hornaspark í høgra borði, og meðan verjan hjá B71 væntaði, at hornasparkið fór at verða sent høgt innfyri í pannuna á Bartal Eliasen, bleiv tað ístaðin sent rættuliga lágt og móti nærmastu stong, har Rúni Elttør hegnisliga stútaði bóltin framvið Waldemar Novicki í málinum hjá B71.

Bert fáar minuttir eftir leiðslumálið hevði heimaliðið ein risa møguleika at økja um leiðsluna, men tá ið Bartal Eliasen skallaði púra leysur framman fyri málinum hjá sandoyingum, bjargaði Waldemar væl við einari hond til horna.

ÍF hevði eitt stórt trýst næstu løtuna, og málverjin hjá fuglfirðingum, Karstin Joensen, hevði ógvuliga lítið at gera, og hann noyddist at renna eitt sindur aftur og fram fyri ikki at gerast ov kaldur.

Gestirnir komu tó fyri seg aftur seinastu løtuna av fyrra hálvleiki, og við eitt sindur av hepni høvdu teir kanska eisini megnað at javna. Brasiliumaðurin Clayton Soares snýtti alla verjuna hjá fuglfirðingum, men komin inn í sjálvan brotsteigin, bíðaði hann ov leingi, og Høgni Zachariassen fekk við einari frálíkari takling steðgað brasiliumanninum.

### Magni punkteraði B71

Eftir steðgin batnaði veðrið munandi, og umstøðurnar at spæla fótbólt í gjørdust nógv betur. Uttan at taka nakað frá sandoyingum so sást tað tó, at leikararnir hjá ÍF sum heild vóru betri bóltspælarar enn sandoyingarnir, og kanska sást tað eisini nokk so væl, at heimaliðið hevði eitt sindur fleiri royndir enn unga manningin hjá B71.

ÍF økti um leiðsluna hjá sær, tá ið 12 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki. Annar av útlendingunum hjá heimaliðnum, Sylla, gjørdi ikki mætari enn at renna frá allari verjuni hjá B71, og tá ið Waldemar kom út ímóti honum, sendi Sylla trygt framvið pólverjanum til 2-0 til ÍF.

Nú vóru fuglfirðingar omaná samanlagt, og tað gekk bert ein lítil løta, so sá tað enn ljósari út hjá heimaliðnum. Bert tveir minuttir eftir 2-0 málið økti íF enn einaferð um leiðsluna. Waldemar í B71-málinum helt ikki einum at síggja til lítið vandamiklum langskoti frá ÍF, og Magni á Lakjuni var skjótur á returbóltinum og sendi í málið til 3-0.

Sandoyingar royndu at flyta liðið hjá sær longur niðan á vøllin, men hetta gav ÍF góðar kontramøguleikar, og heimaliðið hevði nakrar gyltar møguleikar. Sylla skeyt upp um úr stuttari fjarstøðu, og ein púra leysur Bartal Eliasen skeyt beint á Waldemar, tá ið hann fór í kontraálop saman við Magna og Sylla, eftir at B71 hevði havt eitt hornaspark.

B71 gav tó ikki skarvin yvir, og tá ið 72 minuttir vóru leiktir av dystinum, fingu teir javnað og harvið endurskapt spenningin í dystinum. Ein bóltur bleiv sendur út frá brotsteiginum hjá ÍF, har Hanus Clementsen fekk fatur á honum, og hann royndi seg við einum skoti úr umleið 20 metra fjarstøðu. Skotið tók í eitt bein á vegnum og snýtti harvið Karsten í ÍF-málinum, og so var 3-1. Nú var aftur púra opið, tí fekk B71 eitt mál afturat, vóru tað teir, sum vóru omaná samanlagt.

Gestirnir úr Sandoynni royndu nú at trýsta óført, men tað gekk striltið við at koma til teir stóru møguleikarnar. Tað varð eisini lætt hjá verjuni hjá heimaliðnum at verja fyri álopsspælinum hjá B71, tí tað var ógvuliga einstáttað við bóltum beint niðan eftir vøllinum, meðan síðurnar næstan ikki vóru nýttar. Onkra hendinga ferð var uppspælið niðan gjøgnum vinstru síðu, og tað júst eftir eitt slíkt uppspæl, at B71 fekk málið hjá sær. Í høgru síðu var steindeytt, hóast veteranurin Eli Hentze viðhvørt royndi at søkja út har, bleiv bólturin ongantíð spældur út í ta síðuna.

Ístaðin vóru tað fuglfirðingar og Magni á Lakjuni, ið avgjørdu dystin. Einar fimm minuttir fyri leiklok økti Magni um leiðsluna til 4-1, tá ið Waldemar onkursvegna kloddaði eina atsókn frá vandamikla fuglfirðinginum í málið. Bert tríggjar minuttir seinni var Magni aftur upp á spæl, tá ið hann fór frá verjuni hjá B71, og tá ið Waldemar kom út ímóti, lobbaði Magni hegnisliga bóltin upp um pólverjan, og stór frøði á teimum mongu heimaáskoðarunum.

Trivaligi 5-1 sigurin hjá ÍF var ikki ov stórur, men sandoyingar eru óivað rættuliga vónbrotnir um úrslitið. Tað skerst ikki burtur, at B71 hevur eitt ungt lið, og tað er ikki óhugsandi, at nógvir av ungu monnunum hjá sandoyingum hava havt eitt sindur av gummibeinum mikukvøldið, men kanska vísti dysturin eisini veruliga munin á 1. og 2. deild í Føroyum. Í øllum førum fer ÍF ongan veg niður í 2. deild, og B71 noyðist at verða verandi í 2. deild í enn eitt ár.

### ÍF-B71 5-1(1-0)

1-0 Rúni Elttør 27.
2-0 Sylla 57.
3-0 Magni á Lakjuni 59.
3-1 Hanus Clementsen 72.
4-1 Magni á Lakjuni 85.
5-1 Magni á Lakjuni 88.

### Samanlagt:

ÍF-B71 5-2



# Stórur lætti

**Stóri spælari í Fuglafirði mikukvøldið var Magni á Lakjuni. Við trimum málum syrgdi veteranurin um nakar fyri, at ÍF aftur komandi kappingarár verður at síggja í 1. deild**

1. DEILD
*Terji Nelsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ein vælnøgdur Magni á Lakjuni, sum stóð og prátaði við erpnu foreldrini, tá ið vit fingu orðið á hann eftir dystin í Fuglafirði. Magni segði eftir dystin, at tað var ein stórur lætti, nú plássið í 1. deild komandi ár var tryggjað.

### Málið var yvirliving

Magni á Lakjuni sigur, at tað var stórur munur á dystinum mikukvøldið á dystinum í Fuglafiriði og tí á Sandoy tveir dagar frammanundan. – Eg spældi ikki sjálvur við á Sandi vegna skaða, men tá eydnaðist tað hjá B71 at fáa tempoið niður í dystinum, so tað hóskaði seg betur til teirra. Í kvøld hildu vit tempoinum allan dystin, og tað sást nokk so væl aftur í seinna hálvleiki, sigur Magni.

– Málið undan hesum kappingarárinum var yvirliving og kanska eitt sindur betur, og tað hevði verið eitt bakkast fyri felagið, um vit ryktu niður. Tað eru nógv fólk, sum hava arbeitt hart fyri at fáa spælarar til og halda liðnum uppi, og eg haldi sjálvur, at liðið hjá ÍF er ov gott til at spæla í 2. deild, sigur Magni á Lakjuni.

Sjálvur hevur Magni á Lakjuni ikki gjørt av, hvussu verður komandi ár.

– Eg veit ikki enn, hvussu tað verður komandi ár. Eg búgvi í Havn, havi familju og triðja barnið er á veg. Fótbólturin fer við nógvari tíð, so eg fari at umhugsa støðuna í vetur, sigur trímálsskjúttin.


*Við trimum málum var Magni á Lakjuni dagsins maður í Fuglafirði mikukvøldið.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eitt stórt vónbrot

**Liðskiparin hjá B71, Bergleif Sólsker, var ógvuliga vónbrotin mikukvøldið, tá ið tað var greitt, at B71 eisini næsta ár spælir í 2. deild**

2. DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sandoyingar høvdu vónað, at teir komandi ár høvdu vunnið sær rætt til at spæla í bestu deildini, men so er ikki. Liðskiparin hjá B71, Bergleif Sólsker, sigur, at kappingarárið í ár als ikki er nøktandi.

### Vit vóru ikki klárir

Bergleif Sólsker segði eftir dystin móti ÍF, at fuglfirðingarnir vóru meiri tendraðir til dystin. – Teir pressa okkum væl og eru nær hjá okkum allatíðina. Mánadagin vóru vit betur, og tá blivu vit snýttir fyri tvey brotsspørk, ið høvdu kunnað verið ógvuliga avgerandi, sigur Bergleif Sólsker.

Liðskiparin sigur, at teir als ikki eru nøgdir við at gerast nummar tvey í 2. deild, tí teir hava mist týðandi stig móti botnliðum. – Vit hava tapt á útivølli móti VB og KÍ, og tað eru hesi stig, ið nú vænta í. Vit hava ikki verið nóg støðugir á útivølli, og tað kostar, sigur Bergleif Sólsker.

Sambært Bergleifi eru teir á Sandoy farnir undir fyrireikingarnar til komandi kappingár, og tað sær út til, at so at siga alt fólkið verður verandi komandi ár. Bergleif Sólsker sigur avgjørdur, at tað er einki at ivast í, at málið fyri komandi kappingarár verður at vinna 2. deild og harvið flyta upp í 1. deild.


*Liðskiparin hjá B71, Bergleif Sólsker, var ógvuliga vónbrotin eftir 1-5 ósigurin í Fuglafirði mikukvøldið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# U19-landsliðið í eldin á heimavølli

**Í dag verður farið undir EM-undankapping fyri U19-landslið í Føroyum. Á Toftum verður dystur millum Føroyar og Grikkaland**

U19-KAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í dag verður farið undir U19 EM-undankapping í Føroyum. Fýra lond eru í bólkinum, og umframt Føroyar er talan um Grikkaland, Wales og Ungarn. Føroyska landsliðið hevur vant miðvíst til hesa kapping, og longu fyrradagin savnaðist føroyska landsliðið til kappingina.

### Fleiri leikarar úr bestu deildini

Sum áðurnevnt skulu føroysku garparnir í eldin í dag móti grikkum á Svangaskarði klokkan trý. Grikskur fótbóltur hevur tikið seg nógv fram seinnu árini, og sum tey flestu vita, vann Grikkaland jú evropameistaraheitið í fótbólti í summar.

Sunnudagin skal Føroyar royna seg móti Ungarn á Tórsvølli, og týsdagin í komandi viku fara føroyingarnir aftur inn á Svangaskarð, har teir skulu spæla seinasta dystin, ið verður ímóti Wales.

Landsliðsvenjarin, Abraham Løkin, hevur tikið út 18 leikarar til kappingina, og millum teirra eru fleiri, sum eru fastir fúsir á ymiskum 1. deildarliðum her heima. Teir 18 leikararnir eru hesir: Svenn Jacobsen, Poul T. Dam, Páll M. Joensen og Jóhann Ejvind R. Mouritsen úr HB, Tórður Thomsen og Debes Danielsen úr NSÍ, Símun Louis Jacobsen úr GÍ, Jóhan V. Gunnarsson úr B36, Fritleif í Lambanum úr ÍF, Jóhan Petur Poulsen og Ovi Magnussen úr B68, Arnbjørn T. Hansen og Leif Niclasen úr EB/Streymi, Poul N. Poulsen úr VB, Julian Samuelsen úr KÍ, Jónas Tór Næss, Gunnar Nielsen og Bogi Hermansen úr BK Frem.

# Svimjilandsliðið á venjingarlegu

**Um vikuskiftið er føroyska svimjilandsliðið savnað á venjingarlegu**

SVIMJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum nú er hava tríggjar svimjarar longu kvalifiserað seg til Oyggjaleikir, men óivað verður talið munandi hægri, tá ið tað fer at nærkast oyggjaleikunum.

Landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, hevur sent boð eftir 17 svimjarum um at koma á venjingarleguna, sum verður í Fuglafirði um vikuskiftið. Teir 17 svimjararnir eru hesir: Sára Ejdesgaard, Jutta Thomsen og Anna K. Eysturberg úr TS, Andrass Thomsen, Janus Olsen, Bogi Jørgensen, Hanus Eysturdal og Lisbeth L. Joensen úr HS, Beinir Danielsen og Per S. Hansen úr Flot, Haraldur Eið úr Skeggjum, Jákup Ø. Mohr, Karina Petersen, Kári á Høvdanum og Elspa Mørkøre úr FS, Kristian Olsen og Natalia Reinhardt úr Ægir.